## Væntar sær nógv av pumpuni

Tað er Sp/f Hiti í Havn, sum umboðar hitapumpurnar frá Euronom, og stjórin í fyritøkuni, Áki Mortensen, er ikki í iva, tá vit spyrja hann, hvørjar møguleikar teir síggja í hesi framleiðsluni.

– Tá vit royna at marknaðarføra hetta, so er tað sjálvsagt, tí vit síggja hendan partin sum eitt sera áhugavert virkisøki. Sjálvandi kundu vit bara hildið okkum til at selja oljufýrdar ketlar. Men vaksandi oljuprísurin fær náttúrligt fólk at hyggja aðrar vegir. Og at talan við hesum er um grøan orku, er eisini í tíðarinnar anda, sigur hann.

– Tí gjørdu vit okkum skjótt greitt, at vit eisini skuldu kanna, hvørjir aðrir møguleikar vóru á marknaðinum. Her hava vit hvat fyrispurningar til fleiri framleiðarar, og hetta er so tann loysnin, sum vit meta hevur bestu møguleikarnar á føroyska marknaðinum.

Spurdur, um tey longu nú hava selt fleiri slíkar skipanir sigur hann, at útlitini tykjast sera góð.

– Tað er bara góð vika síðani, at vit fingu fyrstu anleggini heim, og tey eru longu seld. Hartil er talan um sera nógvar fyrispurningar. Bæði frá privatpersónum og virkjum. Fyri okkum at síggja er tað eisini ein fyrimunur, at skipanin kann útbyggjast eftir tørvi. Bæði pumpa og ketil finnast í fleiri støddum, og hartil ber eisini til at binda fleiri pumpur saman - ella at nýta aðrar orkukeldur saman við pumpuni. Eitt fjølbroytni, sum hevur við sær, at vit kunnu kappast innan stórt sæð allar partar av marknaðinum, heldur Áki Mortensen.

**-mørk**



*Áki Mortensen, stjóri á Hita, sigur, at tey í fyritøkuni hava sera góðar vónir til hitapumpuna*

# Burtur við oljufýrinum




*Stjórin á Euronom, Åge Hjort, greiðir frá, hvussu slíkar hitapumpur virka. Euronom hevur í 30 ár framleitt hitapumpur av ymsum slag*

**Miðlahúsið var stúgvandi fult, tá HVS-fyritøkan, Hiti, í gjárkvøldi hevði fyrilestur um nýskapandi tøkni innan hitapumpur**

ORKA

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hitapumpur av ymsum slag hava spakuliga vunnið frama seinnu árini. Skipanin í hesum er í prinsippinum, at hiti verður tikin úr eitt nú luft, vatni ella jørðini, fyri síðani at verða leiddur í orkukeldu, sum kann nýtast í húsarhaldinum.

### Nýtir bara luft

Fram um aðrar pumpur, sum eru á marknaðinum, so megnar pumpan, sum fyrilesturin snúi seg um, at nýta orku úr luftini til at hita vatn. Og á tann hátt gera eitt oljufýr púrasta óneyðugt.

Orkuinnihaldi í vatni er munandi størri enn í luft, og tí hevur hetta verið ein prosess, sum hevur verið ov kostnaðarmikil til, at hetta yvir høvur skal loysa seg. Kostnaðarmikið, tí tað ikki uttan víðari ber til at nýta luft, sum er kanska 8 stig at hita vatn upp í neyðugu 70 hitastigini. Tá er munandi lættari at nýta hita úr jørð ella vatni, sum hevur eitt nógv størri orkuinnihald.

Tøknin á ymsu vørunum er tó støðugt betrað, og nú er svenska Euronom so komið við hitapumpuni, sum við hjálp av luft og ongum øðrum ger oljufýrin púrasta óneyðugan. Skal tað sigast heilt stutt, so kann hetta sammetast við eitt kuldaskáp, sum virkar øvugtan veg. Altso har orka verður leidd úr luft yvir í hitalikam, sum so aftur hitar vatnið í ketlinum.

Tað var stjórin á Euronom, Åge Hjort, sum var komin til Føroya at halda fyrilesturin. Og hann duldi ikki fyri, at føroyska veðurlagið er framúr væl egnað til slíkar pumpur. Serliga, tí hitasveiggini í føroysku luftini ikki eru so stór, og at tað tí er munandi lættari at toga eina munandi orkuframleiðslu úr luftini.

Spurdur, hvørt salta luftin í Føroyum ikki kundi verða ein trupulleiki, segði Åge Hjort, at tað heldur hann ikki. Teir partur av anlegginum, sum standa úti, eru allir gjørdir úr rustfríum tilfari, og tí er hetta ikki nakar trupulleiki. Nakað sum eitt nú mongu anleggini við norsku strendurnar hava prógvað.

### Veldugur áhugi

Skal metast eftir áhuganum fyri fyrilestrinum, so er einki at ivat í, at føroyski marknaðurin nú er til reiðar at taka móti tøknini, sum í drúgt áramál hevur vunnið frama í grannalondum. Stúgvandi fult var av fólki. Einamest áhugaðum handverkarum og fólk, sum ætla sær ella eru í ferð við at seta búgv. Í so máta mundi talan vera um rættiliga áhugaverda áhoyrarafjøld hjá seljarunum, og sum skilst, so kom eisini okkurt á ordrablokkin longu hendan dagin.

Á ferðini til Føroya skal Åge Hjort halda tvinnar fyrilestrar. Tann seinni av hesum verður í Tekniska Skúla í Klaksvík í kvøld, og verður hesin kl. 19.

### FAKTA

Hitapumpur av ymsum slag hava verið í støðugari framgongd í fleiri av grannalondum okkara seinasta 30 árini. Talan er tí í flestar mátar um sera væl roynda tøkni.

Lutfallið millum olju- og streymprís er avgerandi fyri rentabilitetin í íløguni, sum verður gjørd í hitapumpu. Hetta er eisini orsøkin til, at rákið úr eitt nú Svøríki nústaðni er komið til Føroya.

Ein nýggj hitapumpa av slagnum, sum varð sýnd fram í gjárkvøldi kostar 72 tkr. Hetta fyri hitapumpu, ketil og stýrieind. Eisini ber til at íbinda aðrar grønar orkukeldur. Eitt nú sól-, vatn- ella jørðhita.

Er talan um nýggj hús skal hetta setast í lutfall til einar 30 tkr., sum svara til oljufýr, ketil og kaminu.

Er talan um oljunýtslu á 3.500 litrar um árið, er nettosparingin knappar 10 tkr. um árið. Hetta grundað á dagsins el- og oljuprísir. Tað merkir, at er talan um nýíløgu, har hitapumpa verður keypt ístaðin fyri verandi oljufýr, er íløgan spard eftir 8 árum. Er talan um nýbygging, er meirkostnaðurin av hitapumpuni vunnin aftur eftir á leið 4 árum.

Væntaða livitíðin á hitapumpuni er á leið 20 ár.

# Jensen og Reistrup aftur á pallin

Leygardagin er árligi aðalfundurin í Føroyingafelagnum í Århus. Seinni um kvøldið spæla Finnur Jensen og Høgni Reistrup í Árstovu mitt í býnum

Føroyingafelagið í Århus hevur aðalfund leygardagin. Áhugin fyri aðalfundinum hevur víst seg at vera stórur. Hetta sæst millum annað í undirtøkuni at stilla upp til nevndarvalið. Eisini er greitt, at nevndin skal finna ein nýggjan formann. Marja Gjógvará, sum hevur myndað felagið seinastu tvey árini, flytir nevniliga heim til Føroya í summar og stillar tí ikki uppaftur.

Seinni um kvøldið verður grýluveitsla í Árstovu, sum føroyahúsið í Århus eitur.

Tá spæla Finnur Jensen og Høgni Reistrup. Finnur syngur og spælir gittar, meðan Høgni roynir seg bæði á gittaranum, klaverinum, munnharmonikuni og við røddini. Teir báðir lesa miðlafrøði og hava spælt nakrar ferðir saman síðani summarið í fjør, tá teir fluttu til býin. Nakrar konsertir í Árstovu er tað blivið til, men nú eru teir eisini byrjaðir at spæla fyri dønum. Sum til dømis í seinastu viku, tá teir undirhildu á eini fríggjadagsbarr á lærda háskúlanum í Århus.

Tey, ið vitja húsið, ið letur upp fyri almenninginum klokkan 23, kunnu vænta eitt sindur av hvørjum tónlistarliga. Nevnast kunnu millum annað Bob Dylan, Coldplay, John Denver, Páll Finnur Páll og føroysk "syngið-við-løg", sum eru á skránni leygarkvøldið. Fyrireikararnir vilja eisini vera við, at tað ikki er ómøguligt, at ein gestatónleikari eisini kemur á gátt í Árstovu.

Meiri kann frættast á heimasíðuni www.aarstova.dk.